


## SAS til reiðar til samanlegging

SAS er til reiðar at sleppa sjálvstøðu síni. Tað sigur samtaksstjórin, Mats Jansson, eftir at flogfelagið júst hevur sett í verk eina spariætlan á knappliga 1,5 milliardir krónur. Soleiðis er skandinaviska flogfelagið við at fyrireika seg til eina sølu, skrivar Børsen. Tað er ikki eitt mál í sjálvum sær at vera sjálvstøðugur. - Tá vit aftur er væl koyrandi og komin gjøgnum resessiónina, so rokni eg við, at vit fara at standa okkum best við at samstarva við ein annan partnara, sigur Mats Jansson. Sum møguligir keyparar verða nevnd Lufthansa sum mest sannlíka, meðan Air France-KLM og í triðja lagi Finnair eisini verða nevnd sum møguligir keyparar. - Eg meti, at konsolidering er tað besta fyri SAS, slær Mats Jansson fast. Áðrenn eina møguliga sølu skal stóra fíggjarliga holið tó latast aftur. Mánadagin vísti ársroknskapurin hjá SAS fyri 2009, at pengarnir fossa úr felagnum við milliardum hvørt ár. Í 2009 kostaði tað 2,2 milliardir krónur at reka SAS.

# Ein heldur øðrvísi framløga



So kallaðar livandi, men stillar standmyndir stóðu runt ymsa staðni í Perluni

**Mánadagin løgdu tveir næmingar úr 10. flokki á Venjingarskúlanum og Kommunuskúlanum, Sasho Bjartsson og Harald Joensen, fram eina verkætlan um ung og happing í Perluni í Havn**

HAPPING
*Marin H. Eidesgaard*
*Sigurbjørg Fríða Nielsen*

Hetta var ikki nøkur vanlig framløga, tí serliga nógv var gjørt burtur úr. Teir høvdu arbeitt við hesum í tríggjar mánaðir og ikki bert í eina viku, sum bólkar flest. Teir høvdu leigað Perluna til framløguna, sum teir høvdu fylt við listaverkum, ið høvdu ein symbolskan boðskap um happing. Millum listaverkini var ein bátur, ið ongar árar hevði, ið lá og rak millum aldur og slapp ikki á land. - Hetta symboliserar ein, ið verður happaður og er rikin ov langt út til at sleppa inn aftur, honum tørvar okkara hjálp, greiddu teir frá.



Eisini høvdu teir fylt tveir dunkar við vatni, sum teir kallaðu happarin, og tann, ið verður happaður. Stórur dentur varð lagdur á, at dunkurin við tí, ið varð happaður, var tyngri enn hin. Eisini vóru málningar, modellir og livandi ljós runt ymsa staðni.

Framløgan sjálv var við powerpoint á stórskíggja í Perluni, og sangi, ið Sasho sjálvur sang. Teir vóru í klæðningi, og á slipsinum stóð skrivað »Ung og happing« og høvdu báðir mikrofon. Eisini høvdu teir dekkað væl upp til áskoðararnar, millum annað var ein sodavatn at fáa, ið teir nevndu »Happuss«. So fóru teir í gongd og greiddi øgiliga nágreiðiliga frá, um hvussu teir høvdu stákast hesar tríggjar mánaðirnar, og hvat teir vóru komnir fram til. Teir tóku alt tað týdningarmikla við, so sum, hvussu happarin og tann, ið verður happaður, kenna tað, og hvat fólk flest gera, tá ið tey síggja happing fara fram.

Eisini høvdu teir tosað við Mentamálaráðið um ymsar kanningar innan fyri happing og høvdu gjørt eina stabbamynd við prosentum. Ein filmur var eisini at síggja. Hann var faktiskt gjørdur út frá einum brævi, ið ein ung genta hevði skrivað inn til eg.fo.

Grundin til at teir valdu hetta evnið er, at teir vilja hava Føroyar at leggja størri dent á happing. Teir meina, at tað fer øgiliga nógv fram í dag, og eingin ger nakað við tað. Tí hildu teir verkætlanina vera eitt gott høvi at siga teirra hugsan.

- Føroyar hava eina umhvørvisviku hvørt ár, har alt snýr seg um umhvørvið, og hvussu tað skal viðfarast. Vit halda tað hevði verið gott við einari viku, ið bara snúði seg um happing, og hvussu fólk skulu viðfarast, siga Sasho og Harald álvarsamir.

Viðmerkjast kann, at áskoðarar og lærarar vóru sera væl nøgdir við fram-






Harald Joensen og Sasho Bjartsson løgdu fram um ung og happing